## Portalurin nýggj met

Portal.fo setti í seinastu viku nýggj met, hesaferð er tað talan um met av brúkarum og vitjanum. Ikki færri enn 46.881 ymsar teldur vitjaðu í í viku 25 Føroya mest vitjaðu heimasíðu, og hesi vitjaðu sambært gallup.fo síðuna 417.261 ferðir, og eingin føroysk heimasíða er vitjað so ofta áður. Eisini síðarn hjá Vikublaðnum tekur egið met í vitjanum, og er nú heilt uppi á 35.775 vitjanum í einari viku. Við eini framgongd uppá 389,4% hevur ung,.fo verðuliga fingið gongd á.




## Umboð frá Dátueftirlitinum er í dag á fundi í Brussel

Á fundinum skal Dátueftirlitið svara ymiskum spurningum í sambandi við at Føroyar hava søkt um triðjalandsgóðkenning frá ES-nevndini.
Tað var á felagsnevndarfundi í desember 2005 Føroyar ES millum, at Føroyar formliga handaðu ES umsókn um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland at flyta persónsupplýsingar til og úr.Viðgerðin av umsóknini er nú komin so væl áleiðis, at Dátueftirlitið í dag skal greiða nærri frá viðurskiftunum í Føroyum á hesum økinum, so greiða kann fáast á, um Føroyar lúka treytirnar fyri at fáa eina triðjalandsgóðkenning.

# Trygd í gávuhýri

**Í sambandi við 75 ára stovningardagin hjá tryggingarfelagnum Trygd hevur felagið gjørt av at geva kundum sínum gávur**

HÁTÍÐARHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Niels Juel Arge, virkandi stjóri, og Janus Thomsen, marknaðarleiðari, við fyrstuhjálps taskunum, sum verða sendar øllum privatkundum hjá Trygd. Taskan inniheldur tvífalt so nógva útgerð, sum ein vanlig fyrstahjálps taska*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leiðslan á Trygd er væl nøgd við gongdina hjá felagnum. Seinastu níggju árini síðani felagið varð endurstovnað og monopolið avtikið, er marknaðarparturin hjá Trygd vaksin úr so at siga ongum upp í 23%.

Felagið varð sett á stovn í 1932, og hevur sostatt 75 ár á baki, men í meiri enn 57 ár hevur monopolstøða valdað á tryggingarøkinum í Føroyum, ein støða, sum ikki broyttist fyrr enn fyri tíggju árum síðani, tá kappingin gjørdist frí. Og nú liggur eitt nýtt tryggingarlógaruppskot í tinginum, sum ætlandi fer at liberalisera tryggingarmarknaðin enn meiri, so útlendskar tryggingarfyritøkur sleppa inn á Føroyska marknaðin – og føroyskar sleppa á tann útlendska.

Í sambandi við 75 ára stovningardagin hevur leiðslan í Trygd gjørt av at veita kundum sínum eina gávu. Fyri privatu tryggingartakararnar verður talan um eina fyrstuhjálpartasku, sum eftir ætlan verður øllum húsarhaldum í landinum í hendi seinast í komandi viku; tey húsarhald, sum eru kundar hjá Trygd, altso.

Fyri vinnukundarnar verður talan um eina aðra gávu. Eisini her er talan um nakað, ið hevur við trygdina at gera, nevniliga ein sonevnd termografering. Hetta er ein avmyndan av eltalvunum hjá øllum vinnukundum við infrareyðum ljósi sum vísir, um trupulleikar eru um at uppstanda í elskipanini.

### Bátur til kunda

Men haraftrat kann í hvussu er ein av kundunum hjá Trygd vænta sær eina gávu aftrat. Tað var nevniliga soleiðis, at Trygd vann bátin, sum Lions Club burturlutar á Ólavsøku, og avgerð er nú tikin um, at hesin báturin skal lutast burtur millum allar tryggingartakarar hjá felagnum.

- Báturin hevur eitt virði upp á 45.000 krónur, so tað verður ein hampilig gáva at fáa hjá tí tryggingartakaranum hjá okkum, sum verður hepni vinnarin, sigur Niels Juel Arge, virkandi stjóri í Trygd.

Annars hava teir givið brandpakkar út til nýggj hús, sum umfata roykvarnarar og brandteppi, og sum naka nýtt fara teir nú eisini at geva slíkar pakkar, tá eigaraskifti fer fram av sethúsum.

Í mun til vaksandi virksemið økist talið á starvsfólkum eisini, og tey eru nú um 30, ið eru í føstum starvi hjá tryggingarfelagnum.

# Millumbygningur tikin í brúk



*Niels Hansen, stjóri í SMS og Kjartan Mohr, varastjóri á Tjaldurs Apoteki, eru báðir sera væl nøgdir við úrslitið av nýggja millumbygninginum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Apotekið hevur verið eitt sindur amputerað seinastu tíðina, meðan millumbygningurin millum SMS og Apotekið hevur staðið fyri umfatandi umbygging**

UMBYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur verið eitt sindur rokaligt at komið á Apotekið í høvuðsstaðnum seinastu mongu mánaðirnar, meðan umbygging er farin fram í millumbygninginum millum Apotekið og SMS.

Men nú er komið undir land hesum viðvíkjandi.

Inngongdin og allur tann parturin av Apotekinum er umvældur og brandtryggjaður, meðan ein stór og majestetisk rundtrappa nú dominerar millumbygninginum.

Nú ber so aftur til at koma inn í bæði SMS í sunnara enda og inn á Apotekið norðanvert sum vanligt var.

Gamli millumbygningurin var illa farin og lak í eyri og seyri, og eisini var ljósið inni á Apotekinum ringt við gomlu konstruktiónini. Nú hava Apotekið og SMS so í felag umbygt millumbygningin, so hann er bæði ljósum og snøggur.